# Munurin millum Suðuroyarmál og føroyskt annars

## í longdaruppfatanini av *p, t, k, s,* + *j, r* og *p, k* + *l*

*Eftir Ulf Zachariasen*

I

Høvuðsmunurin í føroyskum á lokljóðunum (klusilunum) *p, t, k* (tenues, fortes) øðrumegin og *b, d, g* (mediae, lenes) hinumegin er ikki tann, at *p, t, k* eru óraddað (unvoiced) og *b, d, g* raddað (voiced); heldur er hann tann, at *p, t, k* verða framborin við blástri (aspiratión) aftaná, meðan *b, d, g* ongan slíkan blástur hava. Sama er at siga um hesi ljóð í øðrum, men minni enn so øllum norðurlendskum málum. Umframt henda høvuðsmun hava vit í føroyskum kanska eisini spenningsmun millum framburðin av *p, t, k* øðrumegin og *b, d, g* hinumegin — eitt fyribrigdi, sum tó einki ávíst sigst um, fyrr enn veruligar kanningar eru gjørdar.

At *p, t, k* sleppa hesum blástri í summum støðum, er kent í øðrum norðurlendskum málum við. Aftan á *s* (*spara, standa, skorin*) er tað vanligt. Harumframt finna vit, at blásturin í summum støðum verður sleptur aftan á sjálvljóð, haruppií tvíljóð inni í orðum ella í endanum av orðum — fyribrigdið er væl kent í t. d. donskum (»klusilsvækkelse«) og íslendskum. Í føroyskum — eins og í t. d. íslendskum — er hetta seinna fyribrigdið bygdarmálsmerki; tað er tað vanliga í Suðuroynni,

Suðurstreymoy og aðrastaðni (Hammershaimb 1891, Jacobsen og Matras 1961, Lockwood 1955).

Blásturin verður, sum nevnt, sleptur í summum støðum aftan á sjálvljóð inni í orðum ella í endanum av orðum. Hesar støður eru, tá ið sjálvljóðið er langt: *bíta, beit, bitin, lúka, lokin, strúka, opa, róp, reyp, reypa* o. o. At sjálvljóðið er langt, vil siga, at tað er tvíljóð, er tað stutt, er tað vanliga einfaldað ljóð.

II

Nær eitt sjálvljóð verður framborið langt í føroyskum, velst um tyngdina á aftanástandandi hjáljóði ella hjáljóðaflokki. Vanliga krevur einfalt ella stutt hjáljóð í fornmálinum langt sjálvljóð framman fyri sær í føroyskum: *til, fer, skál, loysa, tún* o. s. fr.; langt sjálvljóð er eisini í útljóð í herðingarsterkari staving, t. d. *fæ, træ, gø, bø*. Langt hjáljóð ella hjáljóðaflokkur í fornmálinum krevur stutt sjálvljóð frammanfyri *vatn, inni, uppi, rýmdi, takka, ætla* o. s. fr. Við at kanna orðini *vatn, uppi, takka* og *ætla* leggja vit til merkis, at blástur her er skotin inn *framman fyri* lokljóðinum, t. e. at stutt sjálvljóð krevur blástur framman fyri *p, t, k* — eitt fyribrigdi, sum vit finna aftur uppaftur skilligari í íslendskum (Guðfinnsson 1946).

III

Í føroyskum, eins og í íslendskum eru tað tó ikki allar hjáljóðasamgongur, sum krevja stutt sjálvljóð frammanfyri. Summar samgongur eru, ið tola langt sjálvljóð frammanfyri. Í íslendskum eru tær: *p, t, k, s* + *v, j, r*, (Guðfinnsson 1946). Í føroyskum eru tær mestsum hinar somu: *p, t, k, s* + *j, r* (*v* í hesum støðum varðveitist ikki í føroyskum) umframt *p, k* + *l*. Dømi: *gloprare gn, vitja, skotra, nakrir, flesjar* o. o.; *epli, kvakla, miklir* o. o. (Hammershaimb 1891, Jacobsen og Matras 1961, Lockwood 1955).

Viðvíkjandi *ð* og »bleytum«, spirantiskum *g* er ikki heilt greitt í føroyskum. Hesi bæði ljóð eru viðhvørt herd til lokljóðini *d* og *g*, tá so er, krevst, um tey standa saman við

øðrum hjáljóði, stutt ljóð frammanfyri: *regn, bragd, bidnir* o. o. Spirantiskt *g* kann tó, tá tað stendur framman fyri øðrum hjáljóði, vera varðveitt í ymsum líki í ávísum bygdarmálum, eisini her krevst stutt ljóð frammanfyri. Annars eru hesi bæði ljóð heilt dottin úr málinum[1]), sbr. norskt, hetta er regluligt fyri sambandið *rð*, ið við øðrum orðum altíð hevur langt ljóð frammanfyri: *hurð, orð, verða* o. s. fr. Sama er um norskt at siga (Kolsrud 1951). Ikki-herd sambond *gð* krevja vanliga eisini langt ljóð frammanfyri: *igður, bregða* o. o., men til eru undantøk: *segði, legði,* við stuttum *e,* sum tó møguliga kann verða greitt sum ávirkan frá fleirtalsformunum *søgdu, løgdu* og kanska eisini øðrum *(hevði, høvdu)*.

## IV

Kanna vit Suðuroyarmál, verða vit var við, at har er øðrvísi vorðið. Í Suðuroyarmáli krevja eisini sambondini *p, t, k, s* + *j, r* umframt *p, k* + *l* stutt ljóð frammanfyri.[2]). Dømi: *vitja, vetrar, nakrar, flesjar, epl(i), stikla* o. s. fr. (Hammershaimb 1891). Harumframt leggja vit til merkis, at sjálvt um ljóðið, ið frammanfyri stendur, er stutt, er eingin blástur undan *p, t, k,* hvat føroyskt annars, eisini Suðuroyarmál, altíð krevur (sbr. II). Vit verða var við, at í orðum sum t. d. *epli, miklir, nakrir, hopra* ljóða lokljóðini sum í orðunum *lúka, opa, reypa* o. s. fr., t. e. eins og einki hjáljóð stóð aftur at lokljóðunum.

Vit finna við øðrum orðum í Suðuroyarmáli tvey sløg av sambondum: stutt sjálvljóð + *p, t, k,* eitt har blástur er skotin inn framman fyri lokljóðinum: *vatn, uppi, takka, ætla* o. o., og eitt, har eingin slíkur blástur er: *epl(i), miklir, nakrir, hopra, vetrar* o. o.

Summi tvíljóð eru, har tey eftir reglunum skuldu verið stutt í føroyskum, yvirhøvur betur varðveitt í Suðuroyarmáli enn í

---

[1]) Millum sjálvljóð kemur í ávísum støðum vanliga viðbót.

[2]) *kj* hevur tó eisini í Suðuroyarmáli langt sjálvljóð frammanfyri. Í sambondum *-pn(-)* kann tað eisini bera á, at eingin blástur er framman fyri *p: opna.*

føroyskum annars, viðhvørt so væl, at tey kunnu verða uppfatað sum long: *reytt, eydna, beist, býttur* o. o. Hesi tvíljóð eru: *ei, ey, oy, í-ý* og — mest fyrr — *ú* og *ó*. Tað vil so til, at hesi tvíljóð eru ógvuliga sjáldsom framman fyri sambondum *p, t, k, s* + *j, r* og *p, k* + *l*, tað er tí trupult at meta nakað avgjørt um, hvussu tey í Suðuroyarmáli verða viðgjørd í hesum støðum.

V

Áðurnevndi blástur undan *p, t, k* (II) kann illa vera íkomin uttan grund. Hann tykist at hava til endamáls at lætta um yvirgongdina frá sjálvljóði til lokljóð í tvístavingarorðum, ein yvirgongd, sum er vorðin heilt broytt vegna ljóðalongdarkollveltingina (»kvantitetsomvæltningen«) í føroyskum — ein av fylgjunum av hesi kollvelting er, at málsins kensla viðvíkjandi viðurskiftunum millum stovnin í orðum og stavingauppbýtið í orðum er vorðin ein onnur. Taka vit orð sum t. d. *uppi, detta, takka*, er stovnurin í hesum orðum *upp-, dett-, takk-*, men kanna vit stavingabýtið, síggja vit, at stovnurin verður klovin, fyrra staving verður ávikavist *u* + blástur, *de* + blástur, *ta* + blástur, seinna staving verður lokljóð + aftanástandandi sjálvljóð. At hesin blástur eisini er regluligur í einstavingarorðum *(upp, glapp, datt, sokk o. s. fr.)*, kann skiljast sum ávirkan frá tvístavingarorðum. Blásturin er regluligur við framman fyri sambondum *p, t, k* + hjáljóð, tó ikki *v, j* og (aftan á *p, k) l: vatn, ætla* o. o., eisini hetta kann fyri ein part koma av ávirkan frá sambondum sjálvljóð + langt lokljóð í fornmálinum (*upp, uppi, detta, datt* o. s. fr.). — Taka vit orð sum t. d. *gapa, eta, kóka* úr teimum føroysku bygdarmálum, ið sleppa blástrinum aftan á lokljóðinum (I)[3]), síggja vit, at eisini her tekur seinna staving við, har lokljóðið byrjar. Taka vit so at enda orð við samgongunum *p, t, k* + *j, r* og *p, k* + *l*,

[3]) Tey føroysku bygdarmál, ið halda hesum blástri uppi, hava viðhvørt lyndi til eisini at hava blástur framman fyri lokljóðinum — eitt fyribrigdi, sum annars er ov lítið kannað til, at meira skal verða gjørt við tað her.

síggja vit, at í Suðuroyarmáli, hoyrir lokljóðið upp í fyrru staving, alt tað sum aftaná kemur, upp í seinnu staving *(vit-ja, nak-rir, mik-lir* o. o.), meðan føroyskt annars letur bæði lokljóðið og fylgjandi hjáljóð hoyra upp í seinnu staving *(vi-tja, na-krir, mi-klir).*

Høvuðsstevnan í føroyskum er við øðrum orðum tann, at sjálvljóð í føroyskum verða framborin

1) stutt framman fyri fornum longum hjáljóðum og hjáljóðabólkum við undantak av *p, t, k, s* + *j, r* og *p, k* + *l;* er hitt forna langa hjáljóðið ella fyrsta hjáljóðið í hjáljóðasamgonguni eitt fortis-lokljóð, kemur blástur upp fyri lokljóðið, og er orðið tvístavingarorð, hoyrir fortis-lokljóðið, um tað var langt í fornmálinum, upp í seinnu staving.

2) langt framman fyri fornum stuttum hjáljóði og hjáljóðasamgongunum *p, t, k, s* + *j, r* og *p, k* + *l;* er orðið tvístavingarorð, hoyra hjáljóðið ella nevndu hjáljóðasamgongur upp í seinnu staving.

Sær: Suðuroyarmál, ið altíð krevur stutt sjálvljóð framman fyri fornum longum hjáljóði og hjáljóðaflokki, ið krevur blástur framman undan hesum hjáljóði, um hjáljóðið er fornt fortis-lokljóð ella, tá talan er um hjáljóðaflokk, fyrsta hjáljóð í hjáljóðasamgonguni er fornt fortis-lokljóð, men sum ikki hevur henda blástur framman fyri *p, t, k* + *j, r* og *p, k* + *l,* hóast sjálvljóðið frammanundan er stutt, og sum býtir orð við hesum tilskilaðu samgongum øðrvísi upp í stavingar enn bygdarmálini fyri norðan Suðuroyarfjørð.

## VI

Sostatt verða samgongurnar *p, t, k* + *j, r* og *p, k* + *l* í teimum føroysku bygdarmálum, ið sleppa blástrinum aftan á *p, t, k* í ávísum støðum, frambornar á sama hátt, annaðhvørt sjálvljóðið frammanundan er stutt (Suðuroyarmál) ella langt, og annaðhvørt stavingabýtið klývur hesar samgongur (Suðuroyarmál) ella ikki. Spurningurin er, um hesar samgongur ljóðliga eru so háttaðar, at tær í sjálvum sær hava lyndi til at sleppa blástrinum aftan á lokljóðið, so at eingin blástur fær

komið upp frammanfyri heldur, uttan mun til longdina á frammanfyristandandi sjálvljóði, ella um vit í Suðuroyarmáli hava eitt heldur ungt fyribrigdi, hvørs frámerki er, at sjálvt um Suðuroyarmál annars, eins og føroyskt yvirhøvur, krevur blástur millum stutt sjálvljóð og *p, t, k*, hevur hesin blástur ikki fingið tikið seg upp í hesum serligu førum.

## VII

Samansetingar eru ikki tiknar upp í hesa frágreiðing. Yvirhøvur verða samansetingarnar í føroyskum, tá talan er um munin á longum og stuttum sjálvljóðum, viðgjørdar eins og einføld orð: *gravskitin, berføttur, borðreiða, tilfar* o. s. fr., t. e. við stuttum *a, e, o, i*, men undantøkini eru so nógv og viðhvørt so ógreið, at tað hevur verið hildið beinast at bíða við teimum, til serrannsóknir eru gjørdar.

## SUMMARY

Faroese has normally preaspirated *p, t, k* after short vowel. The change between long vowels (i. e. diphthongs usually) and short vowels (i. e. monophthongs usually) is here determined by the weight of the subsequent consonants, whether, on one hand, these were short in Old Norse or, on the other hand, long or more than one. It is pointed out in the paper that in the dialect spoken on the island of Suðuroy, some consonant groups of which *p, t, k* form the first element, have no preaspiration in spite of a preceding short vowel. In Faroese such groups, as a rule, have to be preceded by an irregularly long vowel. In other words, the Suðuroy dialect has always a short vowel before the consonant groups of the ancient language or a long consonant, but the development of preaspiration of consonant groups is conditional on the consonant with which the stops *p, t, k* are collocated.

## BÓKMENTIR

1. *Færøsk Anthologi* ved V. U. Hammershaimb. København 1891. Bd. I, s. LVII og LVIII.
2. *Björn Guðfinnsson:* Mállýzkur I. Reykjavík 1946, s. 36—39 og 70.

3. *M. A. Jacobsen* og *Chr. Matras*: Føroysk-donsk orðabók. 2. útg. Tórshavn 1961, s. XVII og XXVI—XXVII.
4. *Sigurd Kolsrud:* Nynorsken i sine målføre. Oslo 1951, s. 20—21.
5. *W. B. Lockwood:* An Introduction to Modern Faroese. Færoensia. Vol. IV. København 1955, s. 8 og 22—23.